# Teir smáu stuðla Føroyum

*Hin 29. november var á Fólkatingi fyrsta viðgerð av lóg um blokkstuðul til føroyska heimastýrið fyri 1995. Framsøgufólk fyri allar flokkarnar løgdu fram sjónarmið síni. Serliga teir smáu flokkarnir vístu forstáilsi fyri føroysku trupulleikunum*



**Álit á framtíðina**

Fyri Centrums-demokratarnar var sjálvur folksgrundleggjarin, Erhard Jacobsen, framsøgumaður. Hann segði tað týdningarmesta vera at skapa trúgv á, at tað nyttar nakað hjá føroyingum at fáa gongd á aftur. »Tað er avgerandi, at danska stjórnin verður við til at broyta hugburðin í Føroyum. Eitt hava føroyingar ikki brúk fyri, og tað eru ábreiðslur um, at føroyingar hava borið seg so og so býtt at. Tað avgerandi er at føroyingar skilja, at vit eru tilreiðar at gera nakað,« segði hann og legði afturat, at CD við gleði tók undir við lógaruppskotinum.

**Nøkur vóru, ið bjargaðu sær undan**

Frank Aaen úr Eindarlistanum helt ikki, tað loysti seg at senda pengarnar til Føroya, tá teir fyri mesta partin straks koma niður aftur sum rentugjald til Danmarkar. Heldur átti okkurt at verið gjørt at minka um skuldarbyrðuna hjá føroyingum. – »Byrðan er øll endað hjá meiniga føroyinginum, meðan Den Danske Bank, stórinnskjótarar, Indskydergarantifonden og útlendskir kreditorar sluppu undan. Spurningurin er, hvør veruliga tjenti uppá tað, ið fram fór, og hvør skákar sær undan at gjalda,« segði Aaen og vísti til frágreiðingina um bankakreppuna, ið skýrir hetta sum heilt órímiligt. Eindarlistin tekur undir við blokkstuðlinum, men metir tað neyðugt at bora djúpri í bankamálinum.

**Upprudding í almannaverkinum**

Flestu flokkar løgdu eins og uppskotsstillarin, Mogens Lykketoft, fíggjarmálaráðharri, dent á ta avtalaðu rammulóggávuna á almanna-, heilsu- og skúlaøkinum. Soleiðis legði Christian Mejdahl úr Venstre dent á upprudding í Føroyum. »Trupulleikarnir við rentubyrðuni stava frá eini tíð, tá føroyingar hildu, at sjálvt bjergfyr vaks inn í himmalin.« Men, legði hann afturat, at broyta føroyingar kós, vilja vinstramenn standa við ábyrgdina fyri ríkisfelagsskapinum.

**Vegir og tunnellir**

Kirsten Jacobsen var sum altíð áleypandi og helt ikki, tað hjálpti føroyingum at senda føroysku politikarunum fleiri pengar, ið teir kunnu brúka til fleiri vegir og tunnellir. »Serfrøðingar mugu kanna viðurskiftini, sum í dag eru tað reina kaos. Í dag kunnu fólk fáa forsorgarhjálp í trimum kommunum í senn, og tey fáa meiri burturúr at verða arbeiðsleys,« helt hin óða framburðskvinnan, ið segði seg fara at arbeiða fyri eini veruligari loysn fyri føroyingar.

**Politiska-Búskaparliga nevndin**

Málið var einmælt beint í Politiskt-Búskaparligu nevndina til viðgerðar. Blokkstuðulin hevur breiða undirtøku hjá fólkatingsflokkunum. Men vert er at leggja til merkis tann persónliga áhugan hjá øðrum enn Kirsten Jacobsen fyri føroyskum málum, og at hesin áhugin røkkur út um ábreiðslur og runukast.

**Jóhs. M. Olsen.**

# Skilaleysur útbúgvingarpolitikkur



Eitt av aðalmálunum hjá undanfarnum samgongum seinastu tjúgu árini hevur verið at yvirtaka umsitingarligar uppgávur frá donsku ríkismyndugleikunum. Einastu tíðarskeið, hetta ikki hevur latið seg gjørt, eru tíðarskeiðið 1980-84 og 1989-90, tá ið Sambandsflokkurin hevur verið við í landsstýrissamgongum.

Eitt dømi um slíkar yvirtøkur er skúlafyrisitingin. Í 1978 fingu vit eina skúlafyrisitingarlóg, sum í skundi er gjørd, og har bert er hugsað um fólkaskúlan og studentaskúlan. Lógin ber brá av, at skúlafólk, sum jú ikki kenna til vinnuútbúgvingar, hava havt avgerandi orðið við tilevningini av lógini.

Ein avleiðing av hesi lóg er, at vit hava fingið eina landsskúlafyrisiting, ið telur um 30-40 fólk, meðan Ríkisumboðið umsat skúlaverkið við 3-4 fólkum.

Men verri er, at meðan lógin verður tulkað, sum um hon umfatar allar útbúgvingar, er ikki samsvar millum reglugerðir, kunngerðir og aðrar útbúgvingarlógir, sum framvegis eru í gildi. Hetta ósamsvar millum galdandi lógarheimildir kenna vit í einum tvídrátti millum vinnu og skúlamyndugleikar, har vinnan heldur seg til galdandi vinnuútbúgvingarlóggávu og skúlamyndugleikarnir halda seg til skúlafyrisitingarlógina.

Slíkt lógarsvans hevur Sjúrður Rasmussen, sakførari, greitt frá í fyrilestrum sínum í Útvarp Føroya.

Skúlamyndugleikarnir nýta »sína« lóg til at knúska vinnuna, soleiðis at fólkaskúlalærarar, cand. mag'ar og aðrir akademikarar skulu avgera, hvat ein handverkari, eitt skrivstovufólk, ein skipari, ein maskinmeistari ella ein fiskivinnutøknikari skal læra. Og neyvan verður heldur leingi til sjúkrasystrarnar standa fyri tørni.

Vinnan, sum setti teknisku skúlarnar, handilsskúlan, maskinskúlan og sjómansskúlan á stovn og tók stig til fiskivinnuskúlan, eru nærum sett uttanfyri ávirkan á hesar skúlar. Ein fyri og annar eftir eru teir hoknaðir undir okinum frá skúlamyndugleikunum. Fyrst handilsskúlin fyri at fáa nýggjan bygning á Kambsdali, síðan tekniski skúlin í Klaksvík fyri at fáa nýggjan skúla har, og síðst maskinskúlin fyri at fáa ein nýggjan bygning. Henda bygning fingu teir kortini ikki, men fáa nú ein umbygdan bygning við Oyggjarvegin.

Einasti skúli, sum framvegis hevur klárað at staðið móti trýstinum og sum framvegis er veruligur sjálvsognarstovnur, er tekniski skúlin í Tórshavn. Men hann hevur (í hevnisøku?) verið skerdur nógv meir enn hinir, og vandi er nú fyri, at hann verður niðurlagdur.

Alt hetta hevur ført við sær, at útbúgvingarskipan okkara er farin heilt av lagi. Innihaldsliga økist fráleikin frá tilsvarandi donsku, serliga hvat vinnuútbúgvingunum viðvíkur, so vandi er fyri, at ein føroyskur handverkari, skrivstovufólk, skipari, maskinmeistari ella fiskivinnutøknikari ikki kemur at kunna nýta sítt lærubræv ella prógv uttanlands. Dømi um hetta sóu vit í bløðum herfyri fyri ein av teimum síðst nevndu. Hansara prógv kundi ikki brúkast til nakað, so hann mátti byrja av nýggjum á lærustovni í Danmark. Og at vænta, at t.d. SIT-útbúgvingin kann nýtast til nakað uttanlands, tá ið sjálvt tann føroyska vinnan ikki vil kennast við hana, er barnsligt.

Hyggja vit at útbúgvingarskipan okkara í dag, síggja vit, at føroyski ungdómurin fær eina útbúgving, sum ikki er ætlað føroyska samfelagnum.

Sambært metingum landsskúlafyrisitingarinnar vænta teir íalt 911 miðnámsprótøkur í 1997/98 soleiðis:

Prógv frá studentaskúla, HF-skeiði, handilsskúla og tekniska skúla:

| | |
|---|---|
| studentar | 280 |
| HF'arar | 84 |
| HH'arar | 130 |
| HT'arar | 24 |
| samlað | 518 |

studentar ella 57 %

Prógv innan handil, skrivstovu, fyrisiting og tøkni:

| | |
|---|---|
| FHS'arar | 189 |
| SIT'arar | 108 |
| atstøði | 68 |
| samlað | 365 |

»skúlalærlingar« ella 40 %

Lærlingar við lærusáttmála í vinnuvirki:

| | |
|---|---|
| handilslærlingar | 8 |
| handverkslærlingar | 8 |
| samlað | 16 |

vinnulærlingar ella 2 %

Útbúgving innan fiskivinnuna frá Fiskivinnuskúlanum:

| | |
|---|---|
| fiskivinna | 12 |
| samlað | 12 |

fiskitøkningar ella 1 %

Tá ið havt verður í huga, at lívsgrundarlag okkara er fiskivinna umframt blokkstuðulin, og vit seta vón okkara til eina komandi oljuvinnu, sæst, at her er talan um ein útbúgvingarpolitikk, sum er himmalrópandi skeivur.

Bert 1 % av føroyska ungdóminum tekur útbúgving rættað móti høvuðsvinnu okkara, bert 2 % tekur útbúgving rættað móti sekundervinnu okkara og 97 % tekur útbúgving rættað móti umsiting og fyrisiting av einumhvørjum slagi ella onnur óproduktiv størv!

Hvussu nógvir studentar ella HF'arar fara at skera flak ella fara til skips, kann lesarin sjálvur meta um.

Fyrsta fortreyt fyri at rætta upp uppá henda skeivleika er at gera sær greitt, hvussu føroyski arbeiðsmarknaðurin kemur at síggja út um 5, 10 ella 20 ár og so laga útbúgvingartilboðini til hendan arbeiðsmarknað.

At útbúgva føroyska ungdómin til eitt nú danska arbeiðsmarknaðin, eigur ikki at vera okkara uppgáva, tað kunnu danir sjálvir gera.

Hetta er onki minni enn ein villleiðing av føroyska ungdóminum, hann stendur knappliga við einum prógvi, sum hann ikki kann nýta heima, men verður tvingaður út í onnur lond at finna sær arbeiði. Og hevur tá eitt prógv, sum als ongan førleika gevur.

Og um somu tíð standa vit og mangla útbúgvið fólk til okkara fiskivinnu og væntaðu oljuvinnu.

Her er størsta uppgáva hjá landsstýrismanni okkara í útbúgvingarmálum: aftur at fáa skil á okkara útbúgvingarpolitikk.

Við stevnuskrá Sambandsfloksins í hondini skal hann: »arbeiða fyri, at skúlaskapur okkara altíð er á hædd við tey krøv, sum eitt framkomið samfelag setur.«

Hann skal hava í huga, at: »útbúgvingarskipanin eigur at verða løgd soleiðis til rættis, at føroyingar fáa best møguliga útbúgving á øllum økjum, og at vinnulív okkara eisini á henda hátt fær best møguligar umstøður at arbeiða undir.«

Hann eigur at minnast til, at: »útbúgvingarnar eiga at verða skipaðar soleiðis, at tær liggja so tætt uppat teimum tilsvarandi donsku sum gjørligt, tó við atliti til tey serligu viðurskiftini, sum galdandi eru her á landi. Á henda hátt verður tryggjað, at útbúgvingarnar altíð uttan trupulleikar kunnu góðkennast í Danmark og harvið um allan heim.«

Hann eigur at leggja dent á, at: »tillaga yrkisútbúgvingarnar soleiðis, at tær nøkta tørvin heima, samstundis sum tær verða góðkendar av teimum avvarðandi donsku yrkisfeløgunum.«

Við hesum stavnhaldi kann hann ikki annað enn fáa skil aftur á nærum 20-ára avlaging av útbúgvingarskipan okkara.

**Johan Petersen**



# Oljufyrisitingin søkir eftir fólki

1. apríl skal búskaparfrøðingur setast í starv innan Oljufyrisitingina. Nú ræður um at búgva seg út til oljuvinnuna.

BEATE L. JENSEN

Á Oljufyrisitingini á Debesartrøð skulu teir nú hava ein búskaparfrøðing, sum setast skal í starv 1. apríl.

Búskaparfrøðingurin skal taka lut í arbeiðinum hjá Oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins, einahelst við øllum tí stóra fyrireikingararbeiðinum, ið knýtt er at teimum málum, nevndin viðger.

Her verður hugsað um tær treytir, ið lúkast skulu, tá loyvi skal gevast at leita eftir olju og útvinna olju í føroysku undirgrundini, skatta- og avgjaldstreytir umframt tær vinnulívs- og samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar av møguligum leitingar- og útvinningsvirksemi í Føroyum.

Tí skal búskaparfrøðingurin, sum settur verður í starvið, taka lut í dagliga arbeiðinum á Oljufyrisitingini.

**Út at ferðast**

Alt hetta stóra og umfatandi arbeiði førir við sær nógva ferðing til onnur lond, og krevur arbeiðið, at hann, sum fær starvið, hevur góð samstarvsevnir og evnir at arbeiða undir strongum tíðarfreistum, stendur í lýsingini hjá Oljufyrisitingini.

Tað, sum Oljufyrisitingin tekur sær av, er at umsita undirgrundar- og oljumál sambært galdandi lóggávu, reglugerðum o.a.,og at umsita mál, sum landsstýrið áleggur stovninum, tí hann er stovnur undir landsstýrinum.

Harafrat fevnir arbeiðið hjá Oljufyrisitingini at geva landsstýrinum ráð og vegleiðing í øllum spurningum innan alt, sum hevur við olju og tílíkt at gera, m.a. uppskot til lógir, reglugerðir og almennar fyriskipanir.

**Arbeiðsroyndir telja við**

Áhugað, ið ætla at søkja starvið á Oljufyrisitingini, skulu hava universitetsprógv ella prógv frá øðrum hægri lærustovni, har høvuðsdentur er lagdur á búskaparfrøði. Ein fyrimun hava teir umsøkjarar, sum longu hava drúgvar arbeiðsroyndir innan fyrisiting, vinnulív og gransking, verður upplýst.

Viðvíkjandi lønini, verður búskaparfrøðingurin løntur sambært sáttmála millum landsstýrð og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Umsóknirnar skulu verða Oljufyrisitingini á Debesartrøð í hendi í seinasta lagi 6. februar.

**ARNE NØRREVANG PROFESSARI**



Arne Nørrevang, dr. phil., Tórshavn, er tilnevndur professari við Fróðskaparsetur Føroya. Í tí sambandinum skipar Fróðskaparsetri fyri hátíðarhaldi á setrinum fríggjadagin 27. januar, har Arne fær handað tilnevningarskjalið.

# Partaeigarar í Sjóvinnubankanum og í Føroya Banka í umbúna at stovna felag

Í kvøld kl. 19 verður fundur í Útvarpshøllini fyri partaeigararnar í Sjóvinnubankanum og gamla Føroya Banka.

Ætlanin við fundinum er møguliga at stovna partaeigarafeløg fyri minnilutapartaeigarnar í bankunum.

Endamálið skal vera at virka fyri fíggjarligu áhugamálunum hjá partaeigarunum og krevja skjalainnlit í sambandi við partabrævaumbýtið og samanleggingina av bankunum.

Lise Lyck, búskaparfrøðingur, fer á fundinum at greiða frá royndunum við slíkum partaeigarafeløgum í Danmark og frá teimum rættindum, slík partafeløg hava.

# Fuglakvæðið framført í Norðurlandahúsinum

Fimleikafagnaðurin í ár verður framførdur í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið 21. januar og sunnudagin 22. januar. Evnið hetta fimta árið er Fuglakvæðið.

Hetta er fimta árið, at Føroya Fimleikasamband skipar fyri hesum fagnaði. Byrjað varð í Norðurlandahúsinum 1990, og síðani hevur verið skipað fyri tiltakinum úti í feløgunum.

Nú leygarkvøldið verður byrjað kl. 19.30 og sunnudagin verður byrjað kl. 16.00. Fimleikafagnaðurin skal vísa ein heildarmynd av luttakandi feløgunum. Umframt vanligu fimleikaíðkararnar, so skal felagið eisini hava børn og motionistar við í framførsluni.

Evnini hesi árini hava verið: lívið, samdøgrið, árstíðirnar og tey fýra elementini. Hesaferð er evnið Fuglakvæðið. Feløgini skulu við rørslum, ljósi og ljóði lýsa Fuglakvæðið ella part av kvæðnum.

Aftaná tvær sýningar skulu so 10 tilvildarliga valdir dómarar gera av, hvørt av feløgunum hevur lýst Fuglakvæðið á besta hátt.

Havnar Fimleikafelag, Fimleikafelagið Støkk úr Runavík og Fimleikafelagið Ljósið úr Havn fara at kappast í Fimleikafagnaðinum. Uml. eini 200 fimleikarar úr hesum trimum feløgum vera við.

**Dia**